## UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

### Stjala nógvan fisk

Russisku myndugleikarnir hava nú sett sær fyri at fara í hernað ímóti teirri russisku mafiuni, sum hevur rikið umfatandi ólógliga fiskivinnu, síðani Sovjetsamveldið datt sundur. Mafian hevur ein hóp av trolarum, sum fiska ólógliga. Trolararnir royna serliga í russiska partinum av Kyrrahavinum, og tá eftirlitið ikki hevur verið nóg gott, hevur flotin hjá mafiuni ovfiskað fleiri týðandi stovnar.

Trolararnir hjá mafiuni landa sum vera man ikki fiskin til tær russisku verksmiðjurnar, men allur fiskurin fer av landinum. Sambært russisku myndugleikunum er tað serliga Japan, sum keypir tann ólógliga fiskin. Ein meting hjá myndugleikunum sigur, at tann ólógligi fiskaútflutningurin til Japan hevur summi ár verið sjey ferðir størri enn tann lógligi.

At stovnarnir eru ovfiskaðir, og at fiskurin ikki kemur upp á land hevur havt við sær, at ein hópur av fiskavirkjum fram við russisku kyrrahavsstrondini eru farin á heysin. Fyri smáum tíggju árum síðani komu fleiri milliónir tons av fiski upp á land her, men í fjør var nøgdin bara hálv onnur millión tons. Tað hevur havt við sær, at umleið 40 prosent av arbeiðsplássunum í fiskaídnaðinum eru horvin eftir bert fáum árum.

Men nú hava russisku myndugleikarnir sett sær fyri at fara í hernaðímóti mafiuni. Samráðingar millum russar og japanar hava havt við sær, at í framtíðini skulu russiskir trolarar, sum landa í Japan, hava skjalaprógv, sum skal vísa, at fiskurin er fiskaður lógliga, og at myndugleikarnir hava loyvt trolaranum atfara av landinum at landa.

Spurningurin er so, um mafian klárar at snúgva sær uttan um skipanina. Aðrastaðni er í hvussu er ikki ókent, at mafian hevur rættiliga gott samband við embætisverkið og á tann hátt kann útvega sær neyðugu loyvini.

# Eldur í USA, vatnflóð í Kina

**Meðan amerikanarar stríðast við tann størsta skógareldin nakrantíð í statinum Colorado, stríðast kinesarar við eina ógvusliga vatnflóð í Shaanxi-landspartinum**

NÁTTÚRUVANLUKKUR
*Árni Joensen*



*Meiri enn 1.000 sløkkiliðsmenn við flogførum og tyrlum royna at basa skógareldinum í Colorado*

*Mynd: Reuters*

400 sløkkiliðsmenn, flogfør og tyrlur royna dag og nátt at fáa tamarhald á tí ógvusliga skógareldinum tætt við býin Denver í amerikanska statinum Colorado. Í gjár gjørdu myndugleikarnir av at boðsenda 800 sløkkiliðsmonnum afturat.

Eldurin í Colorado kyknaði eftir øllum at døma á einum tjaldingarstaði tætt við Rocky Mountains. Eldurin breiddi seg skjótt og er nú tann ringasti, sum nakrantíð hevur verið í Colorado. Turkur hevur verið har á leiðini leingi, so eldurin festir í alt, sum fyri er, og tann fríski vindurin ger tað næstan ómøguligt at forða eldinum í at breiða seg.

Sambært myndugleikunum eru meiri enn 20 hús farin upp í royk, og meiri enn 2.000 onnur hús eru í vanda. Í gjár vareldurin komin tætt at tí lítla býnum Roxborough, og myndugleikarnir mæltu teimum 13.000 fólkunum, sum har búgva, til at fara úr býnum.

Tað ger ikki arbeiðið hjá sløkkiliðsmonnunum lættari, at fleiri aðrir skógareldar eru kynkaðir í Colorado seinastu dagarnar.

### Vatnflóð í Kina

Í kinesiska landspartinum Shaanxi hava í minsta lagi 124 fólk latið lív, og næstan 300 eru horvin í einari ógvusligari vatnflóð. Í grannalandspartinum Sichuan eru 24 fólk druknað, og 13 eru ikki komin afturíaftur. Umleið 500 hús eru oyðiløgd, og 1600 hektarar av landbúnaðarjørð standa undir í vatni. Myndugleikarnir siga, at tað er at kalla vónleyst at bjarga fólki nógvastaðni, og teir bera ótta fyri, at umleið 10.000 fólk fara at missa hús og heim.

Tað regnaði av grimd í teimum báðum kinesisku landspørtunum seinasta vikuskiftið, so fleiri áir fóru upp um áarbakkarnar. Tað nógva vatnið hevur oyðilagt vegir og jarnbreytir, og tí er sera trupult hjá bjargingarliðunum at koma teimum neyðstøddu til hjálpar.

# Veik prógv ímóti bumbumanni

**Prógvini ímóti amerikanaranum, sum er undir illgruna fyri at hava ætlað at gera eina geiðslavirkna bumbu, eru ógvuliga veik, sigur verji hansara**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Próvtilfarið ímóti amerikanaranum Jose Padilla, sum sambært myndugleikunum ætlaði at gera eina geiðslavirkna bumbu, er ógvuliga veikt, og skjalatilfarið hjá ákæruvaldinum er í stríð við amerikansku grundlógina.

Tað sigur verjin hjá Jose Padilla, Donna Newman.

Amerikansku myndugleikarnir halda uppá, at Jose Padilla ella Abdullah al-Mujahir, sum hann nú kallar seg, ætlaði at gera eina geiðslavirkna bumbu og at spreingja hana í høvuðsstaðnum Washington.

Ákæruvaldið sigur, at Jose Padilla er ein fíggindi hjá USA, og at hann tí ikki hevur tey vanligu rættindini, sum rættarskipanin annars tryggjar fólki. Ákæruvaldið er tó gingið við til, at maðurin kann fáa løgfrøðiliga hjálp.

Donna Newman, sakførari sigur, at próvtilfarið, sum ákæruvaldið hevur lagt fram, hevur til endamáls at tryggja, at tann tikni kann haldast í varðhaldinum í óásetta tíð. Sjálv ætlar hon sær at royna próvtilfarið í rættinum, tí hon ivast ikki í, at tað stríðir ímóti grundlógini.

Úr Norðurlondum:

### Bondevik kann fáa bót

Norski forsætisráðharrin kann vænta sær bót, tí hann breyt galdandi lóg, tá hann tók tvey fílabein við sær til Noregs. Forsætisráðharrin hevði verið á vitjan í Nigeria, og har valdu vertirnir at heiðra gestin við at geva honum tvey fílabein sum minni um ferðina.

Bondevik tók fílabeinini heim við sær, men tað er ikki loyvt at hava tílíkt við sær til Noregs. Málið er mett so mikið álvarssamt, at tað nú er endað hjá løgregluni. Ein talsmaður hjá løgregluni sigur, at uttan iva verður ákæra reist í málinum, tí talan er um eitt greitt lógarbrot, men spurningurin tykist vera, um ákæran skal reisast ímóti Bondevik sjálvum ella forsætisráðnum.

Sjálvur hevur Bondevik sagt, at tað var ikki hann persónliga, sum tók ímóti gávunum frá nigerisku vertunum, men sendinevndin, sum var við honum. Hann hevur annars sýtt fyri at gera fleiri viðmerkingar til málið, so leingi løgreglan kannar tað.

### Nýta ikki fyribyrging

Ein kanning í Danmark vísir, at næstan helmingurin av teimum ungu nýta einki fyribyrgjandi, tá tey hava samlegu. Hetta ørkymlar læknarnar, sum hava staðið fyri kanningini, tí í einati tilsvarandi kanning miðskeiðis í nítiárunum nýttu meiri enn 70 prosent av teimum ungu okkurt fyribyrgjandi. Læknarnir siga, at tey ungu læra minst líka nógv um fyribyrging í skúlunum nú sum tá, so tað er ikki vantandi kunnleiki, sum ger, at tey ungu eru vorðin meiri líkasæl.

### Fann vápn

Ein maður í Oslo gjørdist rættiliga ovfarin, tá hann nú ein dagin kom fram á eina rúgvu av vápnum á einum parkeringsplássi. Maðurin boðaði alt fyri eitt løgregluni frá, og tað vísti seg, at tað snúði seg um ikki minni enn trettan kassar við maskinbyrsum og øðrum vápnum. Løgreglan sigur, at vápnini vórðu rænd úr einari vápnagoymslu hjá herinum í apríl.



# Eystanstevnan av bakkastokki í kvøld



*Í vikuskiftinum verður Runavíkar kommuna karmur um Eystanstevnuna. Tað verður Hans Petur Ellingsgaard, sum setir stevnuna. Røðari á midnáttarsamkomuni verður Edvard í Skorini Joensen*

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

Eystanstevnan, sum verður hetta vikuskiftið, verður sett leygardagin kl.13.15 av HansPeturi Ellingsgaard, formanni í mentunarnevndini hjá Runavíkar býráð. Við setanina spælir Nes Sóknar Hornorkestur, og Eystankórið fer at syngja.

Á midnátt leygarkvøldið verður midnáttarsamkoma á Torginum, har Eystankórið aftur fer at syngja, og Edvard í Skorini Joensen fer at halda røðu. Tá verður eisini felagssangur, og fýrverk verður skotið.

Tað verður býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, sum fer at handa steypini á Torginum eftir kappróðurin, sum byrjar kl. 15. Eftir steypahandanina syngur Eivør Pálsdóttir.

### Áhugaverd skrá

Í skránni fyri eystanstevnuna er annars hópur av tiltøkum, bæði til gamans og álvara.

Stevnan byrjar í kvøld kl. 18, tá ið ítróttarfelagið Roysni skipar fyri rennikapping. Fyrst fara børnini at kappast, síðan tey vaksnu.

Tivoli letur uppá stevnuøkinum kl. 19.30, og hesaferð standa tjaldini á parkeringsøkinum framman fyri Leikabúðina.

Samstundis, sum tivoli letur upp, verður eisini eitt barnatiltak á Torginum við brandbilum, løgreglubilum, løgreglumotorsúklum og sjúkrabilum. M'a Bluesband fer at undirhalda.

Kl. 19.30 verður dreingjafótbóltur, og kl. 20.00 verður hondbóltsdystur í Ítróttarhøllini millum landsliðið og eitt pressulið, sum fjølmiðlarnir hava sett.

Útikonsertin fríggjakvøldið, sum ætlandi verður á Torginum við ymiskum gospelbólkum, byrjar kl. 21. Viðrar ikki, verður konsertin í Missiónshúsinum á Glyvrum.

### Konsert og dansur

Kabarett verður í Glyvra skúla kl. 21.30, og kl. 23 byrjar tann stóra eystanstevnukonsertin á P-økinum omanfyri Brotið. Har fara bólkarnir, Týr, Clickhaze og Diatribes at spæla.

Samstundis, sum konsertin verður omanfyri Brotið, verður ungdómsdiskotek og dansur í Støkkhøllini, har bólkurin Sic fer at spæla

Vit fara at venda aftur til skránna fyri leygardagin og sunnudagin í Sosialinum í morgin; skráin er annars prentað í blaðnum í dag.

EYSTANSTEVNAN 2002

# Skúlaflokkur á Glyvrum heystaði fruktir av vinarbýarsamstarvi

**Ein skúlaflokkur úr Glyvra skúla var eina áhugaverda ferð í Hirtshals um mánaðarskiftið, mai/juni. Her heystaðu næmingar, lærarar og foreldur fruktir av tí vinarbýarsamstarvi, sum er millum Runavíkar kommunu og Hirtshals kommunu. - Hetta var ein frálík ferð, sum vit øll fingu nógv burtur úr, sigur ein av lærarunum, Magnus Rasmussen.**

UTTANLANDSFERÐ
*Vilmund Jacobsen*

Næmingarnir, sum ganga í 6c í Glyvra skúla, eru nýliga komnir aftur av eini sera væleydnaðari og læruríkari uttanlandsferð í Danmark.

- Vit valdu at fara til Hirtshals, tí Runavíkar kommuna og Hirtshals kommuna hava havt vinarbýarsamstarv í fleiri ár. Eingin okkara ivast í, at hetta valið var rætt, tí í Hirtshals stóðu tey næstan á høvdinum fyri okkum.

Magnus Rasmussen, ið er ein av trimum lærarum, sum var við á ferðini, sigur, at fólk vóru sera blíð og fyrikomandi.

- Vit búðu ókeypis í Hirtshals, og borgmeistarin í býnum bjóðaði okkum øllum í ráðhúsið, har hann prátaði við okkum. Her fingu vit eitt træ heimaftur við, sum nú verður plantað til eystanstevnuna, sigur hann.

Við á ferðini, sum byrjaði 24. mai umborð á Norrønu og endaði aftur á bryggjuni í Havn, 3. juni, vóru eisini fýra mammur at børnunum í 6c.

Primusmotorur aftanfyri hetta stóra tiltak, sum møtti so stórari vælvild, bæði her heima og í Danmark, er Jákup Mortensen, sum er flokslærari hjá hesum flokki.

### Áhugaverd støð

Magnus sigur, at tey vitjaðu nógv áhugaverd støð á ferðini.

- Vit vitjaðu eitt nú Norðsjóvarmuseumið og Ørnereservatet, og vit vitjaðu eitt sonevnt Bunkaramuseum, sum vit hildu vera serstakiliga áhugavert.

Hann sigur, at tað vóru týskarar, sum lótu byggja sonevndar bunkarar undir krígnum. Hesir eru bygdir undir jørð, móti vesturstrondini. Vit vóru niðri í hesum bunkarum og sóu, hvussu hermenn høvdu livað og sovið, samstundis sum vit sóu, hvussu tey vóru bygd.

Magnus sigur, at ein slíkur bunkari mest at kalla er ein betongklossi undir jørð, har veggir og loft eru úr tjúkkum betongi og flag er lagt omaná.

- Her sóu vit, at hermenninir enntá høvdu havt viðgerðarstovur ella sjúkrahús undir jørð. Til verju av hesum støðum, høvdu teir kanónir, sum vendu móti havinum.

Føroyska ferðalagið helt tað eisini vera áhugavert, at danir høvdu hjálpt týskarum at byggja hesar bunkarar og høvdu tjent væl av peningi við hesum arbeiði.

### Ein "oyðimørk"

Magnus sigur, at tey vitjaðu Råbjerg Mile, sum eisini er móti vesturstrondini.

- Á vestursíðu Jútlands liggur vindurin vanliga uppá land, og hesin flytir sandin undan sær, soleiðis at sandurin kemur longur og longur inn í landið. Tá ið so sandurin flytir seg, kunnu trø og annar vøkstur

*Framhald á síðu 23*